VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri og regn av og á. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið leygardagin:
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.



Veðrið sunnudagin:
Fleyr til gul av eystri ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 12 og 15 stig.

Veðrið mánadagin og týsdagin:
Fleyr til gul av landnyrðingi ella av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.

Einaferð var tað ein ær

Samstundis sum føroyingar royna at føra seg fram sum ferðamannaland, tykist líkasæla at ráða mangastaðni, tá hugsað - ella kanska als ikki hugsað - verður um upprudding og viðlíkahald

VITJAN
Edvard Joensen

Føroyingar vilja fegnir føra seg fram sum ferðavinnutjóð. Og vit vísa altíð á, at tað er náttúruna, vit skulu vísa fremmandum gestum, sum koma hendanveg. Men so má náttúran eisini vera nakað at vísa.

Men at hon verri enn so altíð er tað, er skjótt at sanna, tá ein ferðast á føroysku vegunum. Og tað sum verri er, er at tað gingið verður í haganum, er mangan, at sannað verður, at heldur ikki her eru vit nakrar fyrimyndir soleiðis.

Satt er tað, at frá Skaparans hond er føroyska náttúran avgjørt verd at sýna fram. Men so má hon eisini haldast í tí líki, hon er latin okkum. Og viðhvørt er eisini neyðugt at geva Skaparanun eina hjálpandi hond, tá talan er um at taka burtur aftur slíkt, sum liggur á støðum, tað ikki átti at ligið. Eisini hóast tað er slíkt, sum vanliga hevði forgingið í náttúruni.

Men hendan dagin, Sosialurin var ein túr á Hellunum, lá eitt ræð av einum deyðseyði á vegnum. Mitt á einum víkiplássi á almenna koyrivegnum innan fyri bygdina, lógu rovini av tí, einaferð hevði verið eitt livandi kríatúr.

Og tað hevði ligið leingi. Roðið var mestsum heilt og helt beinunum saman, hóast tey annars vóru ber innanundir. Ull var eingin eftir, og kjálkabeinini lógu aftan fyri ræðið.

Her er hetta vanlukkudýrið so deytt. Kanska yvirkoyrt. Men er bara sloppið at liggja her sum ein skomm, fyri at siga tað, sum tað er.

Kann vera, at eigarin hugsar sum so, at nú skal tað liggja til ávaring fyri tey, sum koyra eftir vegnum. Men tað er vánalig hugsan, um so er. Tí slíkt má takast burtur, so tað ikki liggur fyri fólkeygum og lítur annars reina og vakra umhvørvið.

Eitt er so tað, náttúran leggur eftir seg, og vit kunnu hjálpa henni við at forkoma.

Men alt tað órudd og skrambul, vit sjálv blaka frá okkum í nátúruna, er ófyrigevilig synd móti henni.

Rættiliga vanligt er á gongutúrum millum bygdir, fram við vøtnum og á fjøllum, at finna bæði pappír, plast og ikki minst fløskur. Bæði heilar og brotnar.

Og tað skuldi verið revsivert at blakað slíkt frá sær. Tað lítur og er í fleiri førum til beinleiðis skaða hjá tí, sum í haganum livir.

Tað er rættiliga fantastiskt, at tað skal bera til at bera eina fulla fløsku við hvørjum tað nú kann vera, langan veg frá húsum, men ikki heimaftur. Hon er tó lættari tóm enn full!

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	10
Nuuk	6
Qaqortoq	12
Ammassalik	7
Saint John's	14
Halifax	21
Reykjavík	12
Seyðisfjørður	9
Tórshavn	13
Lerwick	11
Aberdeen	16
London	21
Tromsø	12
Bergen	10
Oslo	–
Stokkhólm	20
Keypmannah.	17
Helsinki	16
Moskva	19
Berlin	22
Warzawa	20
Kiev	21
Bukarest	25
Paris	24
Madrid	32
Róm	28
Malorca	28
Athen	29
Malta	33
Tunis	35
Beijing	19
New Dehli	32
Bangkok	30
Jakarta	31
Sydney	15
New York	32
Miami	23
Los Angeles	20
Meksikobýur	24
Panama	32
La Paz	13
Rio de Janeiro	–
Buenos Aires	14

LUFTTRÝSTIÐ



Eitt lágtrýst, 1000 hPa yvir Suður-Noreg fer eystureftir og dýpist. Ein hátrýstryggur yvir Íslandi verður yvir Føroyum fríggjanáttina.

Lágtrýstið við Hvarvið fer móti Íslandi og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum fríggjadagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 26/06 kl. 06⁰⁰– 27/06 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,3°
Minsti hiti máldur í juni: 0,0° Mesti hiti máldur í juni: 20,0°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,7 mm – mált frá 26/06 kl. 06⁰⁰– 27/06 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í juni: 72,5 mm

Spf.
HESTPRENT
…hvør sigur at vit eru sum onnur?
Dvørgastígur 7
100 Tórshavn
tel 31 45 55
fax 31 80 26
hestoy@hestprent.fo

GEVIÐ BLÓÐ
BLÓÐBANKIN
Telefon 311397

VESTFALLSKYRRINDI

19. juni: Mánin næstur jørðini
24. juni: Fullmáni
2. juli: Seinna kvarter/Mánin longst frá jørðini

Kelda: Almanakkin 2002

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
28. juni	10.15	22.39	09.15	21.39	09.30	21.54	—	12.15	00.51	13.15	08.30	20.54	07.30	19.54	10.30	22.54	11.30	23.54	10.00	22.24	11.15	23.39
29. juni	11.03	23.25	10.03	22.25	10.18	22.40	00.39	13.03	01.39	14.03	09.18	21.40	08.18	20.40	11.18	23.40	—	12.18	10.48	23.10	—	12.03
30. juni	11.47	—	10.47	23.19	11.02	23.34	01.25	13.47	02.25	14.47	10.02	22.34	09.02	21.34	—	12.02	00.40	13.02	11.32	—	00.25	12.47
1. juli	00.19	12.50	11.50	—	—	12.05	02.19	14.50	03.19	15.50	11.05	23.28	10.05	22.28	00.34	13.05	01.34	14.05	00.04	12.35	01.19	13.50

5 707265 100050 >